# Tú kanst hoppa alt vikuskiftið fyri 300 krónur

**Á varmakeldu kunnu børn keypa sær vikuskiftisband, sum varar frá fríggjakvøldinum til og við sunnukvøldið. Tá kunnu tey hoppa út í eitt fyri 300 krónur í tríggjar dagar. Er talan um systkin, verður avsláttur á 25% latin**

Tivoli-økið á varmakeldu plagar at vera vælumtókt av børnum og ungum, og ikki minst tær mongu og ymisku hoppi-og skreiðiborgirnar plaga at draga nógv fólk til sín, um viðrar.

Vónbjørt Olsen, sum er í stevnunevndini, sigur, at tey fara at selja vikuskiftisbond til hoppiborgirnar, sum verða einar 5 ella 6 í tali, og hesi kunnu keypast fyri 300 krónur fyri tríggjar dagar.

- Vit geva eisini systkinaavsláttur, soleiðis at er talan um meira enn tað eina barnið, verður 25% avsláttur latin. Hinvegin kunnu børn eisini keypa sær bond, sum vara í eina dag, men Vónbjørt leggur dent á, at tað er bíligari at keypa eitt band fyri allar tríggjar dagarnar, fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin.

Hon vísir á, at bondini fyri ein og ein dag í senn eru bíligast fríggjakvøldið og sunnudagin, tí hesir báðir stevnudagarnir eru styttri enn leygardagurin, sum er tann langi dagurin.

- Fyri 300 krónur, um eingin systkinaavsláttur er, kunnu børnini soleiðis hoppa akkurát, sum tey vilja í tríggjar dagar í slag, sigur Vónbjørt Olsen.

Hon vísir á, at alt tivoli-økið kemur at liggja á økinum við Mentanarhúsið.

- Fríggjakvøldið letur tivoli upp klokkan 19 og verður opið til klokkan 23, leygardagin letur uppaftur klokkan 14 og verður opið til klokkan 23. Sunnudagin klokkan 14 er aftur tivoli á skránni, sum letur aftur seinasta ferð á hesum sinni klokkan 21.30, sigur Vónbjørt Olsen.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað er umtókt millum børn og ung at hoppa í hoppiborg, og á varmakeldu kanst tú keypa tær óteljandi hopp fyri 300 krónur eitt heilt vikuskifti*

# Fuglafjørður bjóðar morgunmat

**Aftur í ár fer Fuglafjarðar kommuna at bjóða fólki til morgunmatarborð í Mentanarhúsinum, har øll eru vælkomin at fáa sær ein bita og hitta vinir og kenningar**

Á varmakeldu í fjør bjóðaði Fuglafjarðar kommuna øllum, sum høvdu hug til tess, til morgunmatarborð í Mentanarhúsinum.

Tiltakið var so væl eydnað, at kommunan hevur gjørt av aftur í ár at bjóða morgunmatarborð, sum letur upp leygarmorgunin klokkan 9.

Vónbjørt Olsen, sum er í stevnunevndini, sigur, at tey, sum møttu upp til morgunmatarborðið í fjør, fingu góðan morgunmat, og hon ivast onga løtu í, at áhugin fyri borðinum eisini verður stórur hesaferð.

**Samvera og prát**

- Eg haldi, at hetta tiltak riggaði ófóra væl. Veðrið var so gott, og nógv fólk serliga úr Fuglafjarðarøkinum leitaðu sær oman í Mentanarhúsið til morgunmat, prát og samveru eina løtu.

Hon sigur, at tú komst í prát við nógv ymisk fólk, og hetta var líka sum ein góð byrjar upp á leygardagin, tá flestu stevnutiltøkini eru.

- Tú møtti fólkum, tú kanska ikki sært so ofta, og so fall prátið yvir á leyst og fast hesa løtu, vit vóru savnaði í Mentanarhúsinum til morgunmatarborð. Jú, eg haldi, at hetta var sera hugnaligt, sigur Vónbjørt Olsen.



*- Eg haldi, at morgunmatartiltakið í Mentanarhúsinum eydnaðist ófóra væl í fjør, og nú verður tiltakið so uppafturtikið, sigur Vónbjørt Olsen*